# Væleydnað Leynarvatnsstevna

*Leygardagin varð árliga leynarvatnsstevnan hildin, og sum vanligt var kappríðing ein av tættunum, sum var á skránni*

JÁKUP MØRK

Stevnutíð merkir ikki bara, at kappróður er á skránni í føroyska ítróttaheiminum. Fótbóltur, renning, súkkling og annað, eru eisni fastir fúsir á hesum stevnum, og eisini reiðfólkið plagar at gera um seg um hetta mundi.

**Ikki í Klaksvík**

Tá norðoyastevna er, eru hesi tó ikki at síggja í Klaksvík, men ístaðin á Leynarvatni, har tað í nógv ár hevur verið fastur táttur at halda stevnu.

Á stevnuni er sjálv kappríðingin høvuðstátturin, og um kvøldið hugnar reiðfólki sær so framman fyri legubáli við felagssangi og øðrum.

Tað skal tó ikki verða trivið so nógv í hetta á hesum síðum, men niðanfyri prenta vit úrslitini frá sjálvari kappríðingini.



*Trý tey fremstu reiðfólkini í 1. flokki, tvíspor. Fra vinstru eru tað Kristfrið D. Jacobsen, Hans P. Poulsen og Gunrid Hansen*
***Mynd: Jens K. Vang***



*Nógv varð lagt fyri, og díkt varð á rossini, til at skunda undir hesi*
***Mynd: Jens K. Vang***

**Trav**

| ne. | Hestur | Reiðfólk | sekund | eigari |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Rigel | Jákup Madsen | 35,3 | Dánjal Magnussen |
| 2. | Stígandi | Heri Dahl | 37,0 | Christian Debes |
| **Tvíspor, ung** | | | | |
| 1. | Fenja | Hallur Hansen | 19,7 | Regin Hansen |
| 2. | Drós | Sigtór Lützen | 20,2 | Sigtór Lützen |
| 3. | Brúsi | Edvard Müller | 20,4 | Edvard Müller |
| **Tvíspor, vaksin. 2. flokkur** | | | | |
| 1. | Sitting Bull | Svenning Reinert | 20,6 | Jóhan á Plógv |
| 2. | Vindur | Dina Splidt | 20,8 | Dina Splidt |
| 3. | Vera | Jákup W. Hansen | 20,8 | Ella Joensen |
| **Tvíspor, vaksin. 1. flokkur** | | | | |
| 1. | Lokkur | Kristfríð D. Jacobsen | 18,4 | Rólant Reinert |
| 2. | Sólvindur | Hans P. Poulsen | 18,4 | Hans P. Poulsen |
| 3. | Aisa | Gunrid Hansen | 18,6 | Æna Reinert |

# Reglurnar skulu herðast

*Á fundi mánakvøldið komu Fótbóltssambandið og dómarafelagið ásamt um, at trygdarkarmurin hjá dómarunum skal betrast. Eisini verður álagt feløgum at finna fram til persónar, sum koma trygdini hjá dómarum í vanda*

JÁKUP MØRK

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so varð dómaravboykottið blást av, eftir at FSF beyð dómarafelagnum til fundar, har greiða skuldi fáast á ymsum viðurskiftum.

Hóast málið hevur havt tað keðiligu avleiðing, at ein av fremstu dómarabólkunum í landinum nú hevur kastað frá sær, so hevur hetta samstundis verið viðvirkandi til at seta gongd í málið um trygdina hjá dómarunum, og hetta má í øllum førum metast sum nakað positivt.

Mánakvøldið var so fyrsta stigið tikið á hesi leið, tá dómarafelagið hevði fund við FSF. Ein fundur, sum FSF bjóðaði dómarafelagnum á, eftir at tað tóktist greitt, at eingin dystur skuldi spælast í bestu deildini undanfarna vikuskifti.



*Børge B. Hansen, formaður í kappingarnevndini*

**Herða reglurnar**

Børge B. Hansen, sum er formaður i kappingarnevndini hjá FSF, sigur við Sosialin, at talan var um ein fund í einum positivum anda, har báðir partar høvdu høvi til at leggja øll kort á borðið.

Úrslitini av fundinum lata heldur ikki bíða eftir sær, og komandi vikurnar verða fleiri broytingar at síggja.

Fyrst og fremst verður talan um økt trygdarkrøv undir dystum í bestu mansdeildini. Sjónligasta broytingin verður, at trygdargeiri skal gerast frá skiftirúmum út á vøllin, soleiðis at dómarar og leikarar ótarnaðir kunnu sleppa til og frá sjálvum vøllinum. Eftir ynski frá dómarafelagnum koma hesar reglur í gildi frá 1. august at rokna, burtursæð frá Klaksvíkini, har hetta verður kravt longu frá fyrstkomandi heimadysti hjá KÍ, sum verður 18. juni.

Harumframt verður talan yvirhøvur um greiðari og herdar mannagongdir fyri trygdarfólkini hjá ymsu feløgunum, soleiðis at dómarar eitt nú sleppa ótarnaðir bæði til og frá leikvøllinum.

**Finnið syndaran**

Í londunum uttan um okkum er tað vorðið alt meira vanligt, at trupulleikin við óskikkiligum áskoðarum verður fluttur yvir á feløgini, og nú er eisini líkt til, at hetta verður galdandi í Føroyum.

Framyvir verður álagt feløgum, har áskoðarar hava gjørt um seg, at finna fram til viðkomandi persón og sekta hendan, soleiðis at viðkomandi í ávíst tíðarskeið verður burturvístur frá fótbóltsvøllinum. Hetta verður eisini galdandi fyri tilburðin í Klaksvík, sigur Børge B. Hansen.

Júst í málinum, KÍ-B68, hevur verið ført fram, at tað kann vera torført at finna fram til viðkomandi persón, og tað er helst eisini rætt, at tað í ávísum førum kann verða ein trupulleiki. Hinvegin kann tó roknast við, at um valið stendur millum at finna syndaran ella at missa heimavøllin, so er helst lítið at ivast í, at syndarin verður funnin.

Formaðurin í kappingarnevndini sigur seg tó vera eitt sindur ivandi í, hvussu langt tað ber til at fara í hesum, men sum sagt, so verður hetta álagt heimaliðinum í framtíðini

**Økt samstarv**

Eitt annað, sum dómarafelagið tóktist ´nøgt við undan fundinum, var, at teir so at siga als ikki verða hoyrdir, tá avgerðir verða tiknar.

Eisini hetta varð tikið upp á fundinum, og skal hetta eisini broytast í framtíðini.

Dómararnir sleppa tó ikki upp í part í dóms- ella kappingarnevnd, tí teir her verða mettir sum ógegnligir. Hinvegin er nú lagt upp til, at dómarafelagið og kappingarnevndin skulu hava regluligar fundir, soleiðis at trupulleikar av ymsum slag kunnu loysast, so hvrøt sum teir stinga seg upp, ísatðin fyri at alt verður koyrt upp í ein spíss, soleiðis sum tað hendi hesu ferð.

Børge sigur at enda, at hann er ógvuliga harmur um tær avleiðingar, sum málið førdi við sær hesuferð, men at hann vónar at stigini, sum nú eru tikin, kunnu vera við til at forða fyri líknandi hendingum í framtíðini.

**Ikki avgjørt**

At enda skal viðmerkjast, at vit hava frætt frá KÍ, at teir enn ikki hava tikið við dóminum í málinum, KÍ-B68.

Hetta hevur annars verið ført fram, men Svend Jacobsen, formaður í KÍ sigur, at so er ikki.

Freistin at kæra gongur úr í kvøld, og í gjárkvødlið skuldi nevndin í KÍ hava fund, har revsingin frá FSF verður til viðgerðar, og skuldi avgerð tá takast um, hvørt felagið tekur við dóminum ella ikki.




Søkt verður eftir

## Handilsfólki

Vit sóknast eftir einum handilsfólki til búnýtisdeildina á Hjalla.
Viðkomandi skal hava áhuga í handilslívinum og vera dugnalig/ur og ágrýtin.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av viðskiftafólki og viðlíkahald av handlinum.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava nakað av royndum við telduarbeiði og vera før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.
Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur hóskandi útbúgving og royndir í handilsvinnuni.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi áðrenn fríggjadagin 09. juni 2000.

Sosialurin - 311820

LITAVAL P/F
Box 1019 • 110 Tórshavn • Tel. 342500
Fax 313847 • E-post: bav@litaval.fo

## Lærarastørv
## Runavíkar kommunuskúli

Til skúlaárið 2000/2001 verður søkt eftir u.l.7 lærarum. Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Serliga er tørvur á lærarum, sum kunnu undirvísa í:

– teldulæru
– natúru og tøkni
– alis og evnafrøði
– smíð
– danskt
– ítrótt

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 20.6.2000.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum tlf. 447331 ella tlf. 447956.

**Runavíkar Skúlanevnd**
v/ Jákup Hansen
Sýnarvegur
FO 625 Glyvrar

## Frá Havnar Handverkarafelag

***Broytt skrivstovutíð***

Skrivstovan er nú opin soleiðis:
**mánadag til og við fríggjadag**
**kl. 09.00–12.00** og
**hósdag seinnapart frá kl. 15.00–18.00**

Telefon 311548 · Telefax 319548
(telefonsvarari tekur ímóti boðum,
tá eingin er á skrivstovuni)

## Samfelagsmøtir í Vági á hvítusunnu

Fríggjakvøldið
kl. 20.00 Bønarmøti í Betel

Leygardagin
kl. 10.00 Uppbyggingarmøti í Betel
kl. 20.00 Evangeliskt møti í Høllini

Hvítusunnudag
kl. 10.00 Breyðbróting í Høllini
kl. 16.00 Uppbyggingarmøti –
kl. 19.00 Evangeliskt møti –

2. hvítusunnudag
kl. 10.00 Uppbyggingarmøti í Høllini
kl. 15.00 Uppbyggingarmøti –
kl. 20.00 Evangeliskt møti í Betel

Hvítusunnudag kl. 16.00 verður
barnamøti í VB-húsinum

Opið hús verður í Betel
leygarkvøldið og hvítusunnudag kl. 22.00

***Øll eru hjartaliga vælkomin!***

**Samkoman í Betel**

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir tveimum stuðulsfólkum til rørslutarnaðan ungan mann í Vágum.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður, í neyvum samstarvi við mannin sjálvan og Almannastovuna, at hjálpa honum við ymiskum dagligum viðurskiftum.

Arbeiðstíðin er fyribils 30 tímar um mánaðin til hvønn. Og er seinnapartar og kvøld.

Setanartíðin er frá 01.07.00.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 31 48 22, Ragnhild Dahl, ella Finnur Joensen, tlf. 31 54 80, millum kl. 9–13, tó ikki mikudag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21.06.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Pensjónsdeildin
att. Finnur Joensen
box 196
110 Tórshavn

## Teknmálsskeið

Í komandi skúlaári skipar Sernámsdepilin fyri ymsum skeiðum í **Teknmáli og Tekn til Talu.**

Yvirlit yvir skeiðini fáast við at venda sær til Sernámsdepilin **tlf. 314522.**

## Viðareiðis skúli

Søkt verður eftir 2 lærarum til Viðareiðis skúla at undirvísa fulla tíð komandi skúlaár.

Annað starvið er tíðaravmarkað frá 1. august til 4. desember 2000. Hitt starvið er fyri alt skúlaárið 2000/2001.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 451180 ella 451175.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjali verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni 2000 og skulu sendast til:

**Viðareiðis skúlanevnd**
v/ Mirjam Heinesen
FO 750 Viðareiði

## Lærarar skúlaárið 2000/2001

Søkt verður eftir 3–4 lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjali verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi **fríggjadagin 16.06. kl. 16.00.**

**Vestmanna skúlanevnd**
v/ Bjørg á Rógvi
FO-350 Vestmanna

## Várkappríðingin í Vágum

Árliga várkappríðingin hjá Vága ríðingarfelag verður tann 17/06/00.

Seinasta freist at boða frá luttøku er mikukvøldið tann 14/06/00 kl. 19.00 á tlf. 332025, 212959 ella 282967.

**Vága ríðingarfelag**

## Ruddingardagar

Við hesum skal verða sagt frá, at skipað verður fyri almennum ruddingardøgum í Runavíkar Kommunu mikudagin 7. og hósdagin 8. juni 2000.

Heitt verður á øll um at taka lut í ruddingini við at savna saman óruddið, fylla tað í sekkir og seta tað við vegjaðaran har fólk frá kommununi beina óruddið burtur.

Gjørt verður vart við at ruddingartiltakið endar hóskvøldið kl. 19.

Runavíkar Kommuna.
**Runavíkar Býráð**